# Virða av-gerðina

**Landsstýrismaðurin í mentamálum ætlar at virða avgerðina hjá Løgtings umboðsmanni, men tað er ikki líkt til, at hetta fær nakra ávirkan á sjálva setanina**

SETAN
*Heri á Rógvi*

Nógv umrødda málið um setanina av nýggjum landsantikvari varð eisini viðgjørt í sambandi samgongusemjuna.

Høgni Hoydal sigur, at hann greiddi frá sínari støðuni í málinum, og málið hevur eisini verið uppi og vent á landsstýrisfundi týsdagin.

Magistarafelagið hevur boðað frá, at felagið leggur málið fyri umboðsmannin í vikuni.

– Vit eiga at virða avgerðina hjá umboðsmanninum, sigur Høgni Hoydal.

Hetta skal skyljast á tann hátt, at avgerðin hjá umboðsmanninum fer at siga nakað um viðgerðina av málinum, men setanin verður neyvan ógildað.

– Viðgerðin av hesum málinum hevur verið fullkomiliga hysterisk, sigur Høgni Hoydal.

Hann vil ikki svara upp á hypotetiskar spurningar um, hvat hann fer at gera, alt eftir svarinum frá Løgtingsins umboðsmanni.

Tjóðveldisflokkurin fer í næstan at velja sær nýggja landsstýrismann. Flokkurin hevur enn ikki viðgjørt spurningin, meðan samgongustevið hevur verið til viðgerðar.

Steffen Stummann Hansen:

# Tað hevur ikki verið stuttligt



*Steffen Stummann Hansen er farin til verka, og alt bendir á, at hann eisini kann vera sitandi hesi fimm árini, um hann vil. Sjálvur er hann glaður fyri at vera í Føroyum, men nógva rokið vildi hann fegin verið sloppin undan*

**Nýggi landsantikvarurin angar ikki, at hann søkti starvið og kom til Føroya, hóast nógv rok hevur verið um setanina. Men hann vildi fegin verið sloppin undan rokinum**

SAMRØÐA
*Heri á Rógvi*

– Nei, eg angri ikki, at eg søkti, sigur Steffen Stummann Hansen.

Svarið gevur kanska seg sjálvt, tá hann nú situr yvirav okkum í besta kontórinum hjá Føroya Fornminnissavni í frálíka vøkru náttúruni í Gomlu Hoyvíkini.

Hann byrjaði í starvinum mánadagin. Men føroyingar kenna hann longu. Hann hevur verið at kalla mest umtalaði maður í føroysku fjølmiðlunum seinastu mánaðirnar.

Hann roynir heldur ikki at fjala útyvir, at hann fegin vildi sloppið undan at verið so nógv í yvirskriftunum.

Men í Føroyum er gott at vera, heldur Steffen Stummann Hansen, sum ein stóran part av áttatiárunum búði í Føroyum í sambandi við útgrevsturin við Toftanes í Leirvík.

Og hann býr nú aftur í Leirvík. Hann hevur leigað sær eini hús, og hvønn morgun ferðast hann teinin úr Eysturoynni til Havnar. Hóast tað er ein tími at koyra, so hugsar Steffen ikki, at hetta er nakað at hugsa stórvegis um.

– Eg kenni væl Leirvík frá útgrevstrinum í áttatiárunum, og mær dámar eisini væl í Leirvík, sigur Steffen Stummann Hansen.

Sostatt fær nógva rokið ikki Steffen Stumman Hansen at halda seg burtur.

Hann virkar eisini rættiliga lítið ávirkaður av rokinum, tá hann situr yvirav okkum og svarar spurningum.

Hvussu hevur hesin danski fornfrøðingurin so upplivað at standa ovast á breddanum næstan uttan íhald?

– Lat meg siga, at tað hevur ikki verið stuttligt. Tá eg havi verið í Danmark, so havi verið eitt sindur vekk frá øllum og havi sostatt ikki lisið alt, sum er skrivað, men eg eri sjálvandi vitandi um alt rokið, sigur Steffen Stummann Hansen

Og tað skal ikki vera nakar ivi um, at Steffen Stummann Hansen fegin vildi verið sloppin undan øllum rokinum.

– Eg søkti jú bara eitt starv sum onnur. Hetta er tað einasta, eg havi gjørt. Tann nógva umtalan er komin aftaná, og tað er nakað, eg fegin vildi verið sloppin undan, sigur Steffen Stummann Hansen.

– Alt hetta stríðið hevur verið slítandi fyri allar partar, sigur Steffen.

Tá vit spyrja hann, um hann allatíðina hevur verið líka vísur í at taka av tilboðnum, so hvørt sum stríðið um hansara setan vaks, er hann ikki so skjótur at svara.

– Tað er ringt at siga, hvat eg havi hugsað alla hesa tíðina, men eg tók jú eina avgerð, tá eg søkti starvið, og eg haldi fast við mína avgerð, sigur Steffen Stummann Hansen.

Hann er fluttur úr Danmark og búsett seg í Føroyum við einum sáttmála fyri fimm ár.

Áðrenn hann kom til Føroya starvaðist hann hjá Nationalmuseumet í Keypmannahavn, har arbeiddi við at gera bøkurnar um útgrevsturin á Toftanesi lidnan.

Hann hevur eisini tvær aðrar bøkur klárar at geva út við støði í eldri útgrevstrum í farnu øld.

Lærdi háskúlin í York fer seinni at útgeva eina bók hjá honum um víkingatíðina, og hvussu hetta var við at skapa eitt føroyskt samfelag.

Hann skilur tað mesta av føroyskum, og hann ætlar sær at leggja eftir at fara at tosa hetta sama mál sum skjótast.

– Mær dámar ógvuliga væl í Føroyum, og so er hetta eisini fakliga avbjóðandi, sigur Steffen.

Hann hevur enn ongi greið boð um, hvussu tað fer at merkjast, at nýggjur stjóri er komin á Føroya Fornminnissavni, men hann vil fegin eitt nú gera sambandi við bygdasøvnini betri og gera savni í Hoyvík meira sjónligt.

–Hesa næstu tíðina fari eg at nýta at seta meg væl inn í tingini og mannagongdir her á stovninum, sigur Steffen Stummann Hansen, sum eisini hevði fingið nøkur blomstur á borðið hjá sær, hóast fráboðanir vóru um eina kalda móttøku.

Til tað, at starvsfólkini á Fornminnissavninum framvegis ynskja starvsetanina ógildaða, hevur Steffen ikki so nógvar viðmerkingar og sigur bert, at hann er komin at gera arbeiðið, hann er settur til at gera.

**Fakta**

| | |
|---|---|
| Navn: | Steffen Stummann Hansen |
| Aldur: | 48 ár |
| Starv: | Landsantikvarur |
| Ùtbúgving: | Mag.art í forsøguligari fornfrøði |
| Royndir: | Umframt at hava lisið fornfrøði og eitt sindur av søgur, hevur Steffen Stummann Hansen luttikið í eini røð av verkætlanum – bæði í Føroyum, Grønlandi og aðrastaðni. Hann hevur eisini útgivið fleiri verk, og tvær bøkur eru á veg. |



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.



## Sigmar Hansen til Arbeiðseftirlitið

Mánadagin 17. mars var Sigmar Hansen á Velbastað settur í starv sum eftir-litsmaður á Arbeiðseftirlitinum í Havn. Sigmar, ið er 43 ára gamal, er føddur og uppvaksin í Havn. Eftir at hann hevði lært til elektrikara hjá Einar Michelsen, fór hann á maskinskúla og tók útbúgving sum maskinistur. Hann arbeiddi í nøkur ár sum servicumaður innan hvítvørur. Í 13 ár sigldi hann sum maskinmeistari við grønlendskum rækjuskipi. Seinastu 4 árini hevur hann siglt sum maskinstjóri við donskum og norskum skipum. Uppgávurnar hjá honum á Arbeiðseftirlitinum verða at hava eftirlit við trukkum, kranum, billyftum, persónlyftum v.m.

**mg**

## Sjúrður Fróði Olsen professari



Dr.med. Sjúrður Fróði Hansen úr Havn varð 1. februar útnevndur til professara í epidemiologi við "Det Sundhedsvidenskablige Faktuelt" á universitetinum í Aarhus.

Sjúrður hevur kannað hvønn týdning maturin hevur fyri kvinnur, sum eru við barn. Í kanningunum hevur hann sammet matvanar í Føroyum og Danmark. Í samstarvi við Perinatal-Epidemiologisk Forskningsenhed á sjúkrahúsinum í Skejby hevur hann gjøgnumført eina stóra evropeiska kanning við at geva tilskot av fiskaolju til kvinnur, sum eru við barn. Í løtuni er hann við leggja ætlanir um eina kanning av kvinnum, sum eru við barn í Kina, har tær ikki eta nógvan fisk. Hendan kanning skal vísa um tilskot av fiskaolju minkar um vandan fyri, at børnini verða ov tíðliga fødd og minka um vandan fyri trupulleikum hjá ov tíðliga føddum børnum.

Tey seinnu árini hevur Sjúrður arbeitt við donsku verkætlanini "Bedre sundhed for mor og barn", har 100.00 kvinnur, ið eru við barn, luttaka. Hetta er størsta kanningin av sínum slagi í heiminum. Sjúrður samstarvar við fleiri altjóða granskingarstovnar.

Sjúrður, sum er 45 ára gamal, bleiv í 1984 cand. med á universitetinum í Keypmannahavn, og í 1987 bleiv hann M.Sc. í epidemilogi á London School of Hygiene and Tropical Medicine. Á universitetinum í Aarhuus vardi hann sín doktararitgerð í 1993 og sína ph.d.-ritgerð í 1994.

## Dagurin

20. mars. Gordius, deyður umleið 300. Rómverskur hermaður, sum gjørdist kristin og varð tikin av døgum.

## Høgni Mikkelsen á ting



Týsdagin tók Høgni Mikkelsen, byggimeistari í Havn, sæti á tingi fyri Lisbeth L. Petersen. Tey vóru bæði uppstillað á sambandslistanum í Suðurstreymoy.

Sambandsflokkurin hevi eitt gott val seinast, og flokkurin fekk trý fólk vald á ting. Lisbeth Petersen gjørdist størsti atkvøðuslúkarin við 1394 atkvøðum. Næstur henni var Heðin Mortensen við 409 og Kaj Leo Johannesen við 264 atkvøðum.

Høgni Mikkelsen var næstur við 201 atkvøðu, og fall tað tí í hansara lut at taka sæti sum varamaður á tingi. Høgni Mikkelsen hevur ikki sitið á tingi fyrr, og tí skuldi løgtingið fyrst kanna atkvøðubýtið, áðrenn tingmenn kundu atkvøða fyri, at Høgni Mikkelsen kundi taka sæti.

Høgni Mikkelsen varð eisini valdur í Tórshavnar Býráð í november 2000. Hann er útbútgvingin timburmaður og hevur egið byggivirki í Havn, har hann mest fæst við at byggja hús og íbúðir.

Høgni Mikkelsen er sonur Karl Johan og Katrinu Mikkelsen í Havn.




# Nøvn í vikuni

**Kennir tú onkran …**



Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.

Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd. Annars hava vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgávur.

Navn:..........................................................................................
Bústaður:.....................................................................................
Bygd/býur:..........................................Tel:.................................
Evt. arbeiðspláss:.........................................................................

Merkisdagurin er: ..........................................................................

Innsendari: ................................................Tel:............................

Sendið lepan, í brævbjálva, til:
Sosialurin • Postboks 76 • FO-110 Tórshavn • "Nøvn í vikuni"

Eisini ber til at støkka inn á gólvið, ringja, faxa ella senda teldupost til redaktiónir okkara kring alt landið:

Høvuðsstaðarøkið: tel. 311820/216135, fax 314720, teldupost: maggi@sosialurin.fo
Norðoyggjar: tel. 458686, fax 458687, teldupost: solby@sosialurin.fo
Eysturoy: tel. 447820, fax 449520, teldupost: vilmund@sosialurin.fo
Suðuroy: tel. 375364, fax 375464, teldupost: aki@sosialurin.fo
Vágar: tel. 333820, fax 333720, teldupost: edvard@sosialurin.fo